# Fimm nýggj fólk sæti á tingi mikudagin

Á løgtingsfundinum mikudagin, tá løgtingið fer at skipa nevndir og ráð, møta fleiri nýggj fólk á tingi.

Síðani síðsta tingfund, sum var á kyndilsmessu, eru seks nýggj fólk tilnevnd í landsstýrið. Fimm teirra, Høgni Hoydal, Bjørt Samuelsen, Tórbjørn Jacobsen, Helena Dam á Neystabø og Karsten Hansen, eru vald á ting, og mugu tí leggja sæti á tingi frá sær.

Fyri tey møta Páll á Reynatúgvu (330 atkvøður), Heidi Petersen (305 atkvøður) Olga Biskopstø (255 atkvøður), Mikkjal Sørensen (247 atkvøður) og Tordur Niclasen (123 atkvøður). Hesi fimm fara at hava fast sæti á tingi, so leingi hini fólkini eru í landsstýrinum.

Umframt hesi, so fer Aksel Vilhelmson Johannesen at møta á tingi fyri Javnaðarflokkin. Tað er tí, at Gerhard Lognberg er sjúkrameldaður í minsta lagi fram til 24. februar.

Aksel Vilhelmson Johannesen hevur ikki verið uppstillaður áður. Hann fekk 238 persónligar atkvøður. Hann býr í Klaksvík, starvast sum advokatur í Havn og er sonur Vilhelm Johannesen, sum var tingmaður Javnaðarfloksins frá 1980 til 2008.

Sostatt verða bara tvey fólk í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum, sum vórðu vald á ting 19. janauar og fýra eykafólk.

# Øll kunnu veita Skálavík eina hjálpandi hond



Skálavík vart hart rakt í ódnini herfyri. – Nú kunnu øll veita teimum eina hjálpandi hond, sigur John S. Myllhamar, sum er ættaður úr Skálavík



**Tað fer at kosta nógvan pening at byggja Skálavík uppaftur eftir herviligu ódnina og herviligu skaðarnar á havnarlag, bátar og annað herfyri. Nú fer ein innsavning í gongd at hjálpa kommununi at byggja alt upp aftur**

INNSAVNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skálavík:** Hvørki borgarstjórin í bygdini, Linjohn Christiansen ella fólk á staðnum høvdu nakrantíð upplivað eina slíka ódn sum var herfyri.

Á havnarlagnum í bygdini var alt eitt stórt kaos, og tað einasta fólk við vissu kundu staðfesta var, at skaðin var øgiligur:

Ikki ein heilur bátur var í bátahylinum. Nógv grót var komið inn í sjálvan bátahylin. Gamli kirkjugarðurin hevði fingið skaða, og tað hevði so mangt annað eisini fingið.

Borgarstjórin dugdi at síggja, at hetta fór at verða kommununi ein alt ov stórur biti at skula byggja alt uppaftur til tað sum tað var fyri ódnina. Her máttu landsins myndugleikar, tryggingar og aðrar góðar kreftir koma uppí leikin. Og tað eru tær longu komnar:

Borgarstjórin á Sandi, Páll á Reynatúgvu var skjótur úti við eini hjálpandi hond, og lovaði at hansara kommuna fegin vildi stuðla skálvíkingum í hesum stóra og neyðuga arbeiði.

Og nú hevur ein maður í Sandavági, John S. Myllhamar tikið stig til eina peningainnsavning til tess at hjálpa Skálavíkar kommunu í hesum arbeiðinum.

- Vit føroyingar eru kendir fyri at hjálpa á øðrum støðum og heimspørtum, tá vanlukkur raka har. Nú fáa vit ein møguleika at rætta ein hjálpandi hond her til okkara egnu landsmenn, sigur hann við Sosialin.

Hann hevur stovnað eina hjálparkonto í Eik, hagar fólk kunnu flyta pening um tey hava áhuga fyri tí.

## Ongin møguleiki

John S. Myllhamari kom beinanvegin til hugs, at nú kundu vit føroyingar sjálvir hjálpa í egnum landi.

Hóast John hevur búð í Sandavági í fleiri ár, bankar hjarta hansara framvegis fyri heimbygdini, Skálavík á eystursíðuni á Sandoynni.

- Vit hoyrdu borgarstjóran í Skálavík siga, at tey høvdu ongan møguleika at byggja uppaftur alt tað, sum náttúrukreftirnar høvdu lagt í oyði fram við strondini.

- Nú kunnu so einstaklingar, feløg, stovnar og onnur veita teimum eina peningagávu til endurreisnina av hesi lítlu kommununi, sigur John.

Tað eru ymiskir mátar at skipa eina slíka innsavning. Sjálvur er hann ikki hugaður fyri at fáa fólk at gagna hús úr húsi at savna inn, men hevur valt ein annan leist í hesi innsavningini.

Í morgun var hann í sambandi við Eik, og fekk har ein serstaka konto, hvørs peningur fer óskerdur til bygdarráðið at arbeiða víðari við.

Kontonummarið er 9181-1662904.

## Skoða skaðan

Í miðlunum sær ein ofta, at statsleiðarar vitja slík støð, har ein hervilig ódn hevur herjað. Í farnu viku gjørdi okkara løgmaður tað sama.

Hetta man vera fyrstu ferð at ein føroyskur løgmaður hevur vitjað eitt skaðaøki í landinum fyri persónliga at skoða skaðarnar.

Eftir døgurða henda dagin fór Jóannes Eidesgaard løgmaður saman við tveimum embætisfólkum til Skálavíkar fyri við egnum eygum at skoða teir skaðarnar eftir ódnina.

Hann helt, at tað var bæði rætt og rímiligt at løgmaður vísti skálvíkingum virðing við at vitja á staðnum.

Ætlanin hjá Sosialinum er at fylgja við í, hvussu gongur við innsavningini til Skálavíkar.

# Leirvíkingar økjast í tali



*899 fólk búgva nú í Leirvík*

Á nýggjárinum búðu 889 fólk í Leirvík móti 873 á nýggjárinum í fjør. Hetta er ein vøkstur á 16 fólk ella 1,83%.

Fólkatalið í Føroyum var á nýggjárinum 48.455 fólk, samanborið við 48.350 í fjør. Her er talan um ein vøkstur á 0,22%.

- Sostatt liggur fólkavøksturin í Leirvík væl oman fyri miðal fólkavøksturin í landinum sum heild, sum annars má metast at vera sera lágur, skrivar heimasíðan hjá kommununi.

Vøksturin í fólkatalinum í Leirvík stavar frá eini nettotilflyting á níggju fólk og einum burðaravlopi á sjey fólk.